## DAGSINS MEINING

# Miðvísari gransking

Í gjár og í dag hevur blaðið havt samrøðu við samfelagsfrøðing, ið ger vart við týdningin, sum samfelagsvísindaliga granskingin hevur fyri Føroyar og fólkið her býr. Hann heldur, at henda gransking hevur ikki verið nóg høgt raðfest av eitt nú politisku skipanini og vísir á, at vit nú eiga at taka henda táttin í nógv størri álvara. Serstakliga nú vit ganga eini nýggjari avbjóðing og tíð á møti við oljuvinnuni er hetta sera umráðandi. Tó so – at henda gransking undir øllum umstøðum er av stórum týdningi við ella uttan olju. Men nýggja avbjóðingin ger so, at vit eiga at rakna við og taka granskingina í størri álvara. Hon skal vera við til at skapa tað grundarlagið, ið okkum tørvar fyri at kunna taka støðu og velja, hvønn útvikling vit ynskja í hesum samfelagnum.

Í hesum sambandi er umráðandi at fáa neyðugu midlarnar til slíka gransking, tvs. pengar og fólk, sum so aftur skulu til at útvega upplýsingar og data til at kunna gera ymsar verkætlanir út frá. Tað er skyldan hjá einum samfelag at kenna sínar egnu fortreytir og at verða fyrireikað til framtíðina. Tað kann eitt nú samfelagsgranskingin verða við til at stuðla undir. Og tað eigur eisini at vera okkara egna uppgáva at seta út í kortið. Men hetta eigur eisini at verða gjørd í tøttum samstarvi við serkøn fólk aðrastaðni frá, ið hava nógvar royndir og vitan at geva okkum. Eingin sigur, at djúpi borðiskurin skal uppfinnast av nýggjum.

Tað hevur verið funnist at, hví ikki pengar frá oljufeløgunum eisini kunnu gagna okkara mentan. At tað ikki kann vera rætt at brúka teir pengar, sum feløgini lata fyri at hava fingið leitiloyvi her, bara fara til førleikamenning innan oljuvinnuna. Hetta meta fleiri kundi verið gjørt nógv breiðari, soleiðis at tað ikki bara snýr seg um at førleikamenna eina vinnu, men heldur um at førleikamenna eitt heilt samfelag.

Vit eiga sjálvandi at læra av royndum, og har vit møguliga hava verið í so einsrættað, eiga vit at fáa ein víðari sjónarring. Tað vildi tí verið rætt at umhugsað at sett á stovn ein grunn við pengum frá bæði oljufeløgum og landskassa, sum umframt at førleika vinnuna eisini hevur til endamáls at stimbra mentanina og her kanska ikki minst samfelagsvísindaligu granskingina. Til at umsita hann kundu verið umboð fyri nøkur av stýrunum, oljufeløgini o.o. Hvussu stóran týdning samfelagsvísindaliga granskingin hevur kemur væl til sjóndar í umrøddu samrøðu í blaðnum. Latið okkum brúka hana sum grundarlag fyri einum uppbyggjandi orðaskifti næstu tíðina og ikki til at sláa hvønn annan í høvdið við.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skúlin skal betrast ikki klúgvast í fólkaskúlar og privat skúlar

**Eyðólv Dimon**
*Hoyvík*



Í fólkaskúlanum verður støði lagt undir lívslongu læringina. Hetta eru virði, sum er fortreytin fyri at skilja egnu mentan og tað góða, ið kann fáast úr øðrum mentanum. Lívslanga læran er bæði persónlig og faklig menning, men fólkaskúlin skal ikki geva nakran "fasitlista" til allar lívsins spurdómar. Foreldur og lærarar hava felags ábyrgd fyri skúlanum og eiga at samvinna og stuðla hvør øðrum. Men skulu vit menna føroyska fólkaskúlan, tá er tað ein fortreyt, at vit hava ein felags fólkaskúla og ikki minka ella klúgva játtanina til føroyska skúlaverki í almenna fólkaskúlan og privatar skúlar.

**Játtanin má hækkast.**
Fólkaskúlin kundi veri nógv betri, men forðingin fyri einum betri fólkaskúla er, at skúlin ikki fær tað játtan, sum krevst. Nýggja fólkaskúlalógin leggur upp til, at undirvísingin skal tillagast til tann einstaka næmingin. Næmingarnir eru sera ymiskt fyri, og tí kann lærarin fáa eyka lærara til næmingar við serligum tørvi. Men av illvilja frá politiskari síðu, so fáa skúlarnir bert 1/3 av teimum tímum, søkt verður um. Lærarafelagið vísti á, at nýggja fólkaskúlalógin fór at kosta yvir 100 mio. kr. at seta í verk, og seinastu árini er játtanin hækka við einans 70 mio.kr. T.v.s. at her mangla yvir 30 mio. í fyri at gjalda tann meirkostna, sum fólkaskúlalógin ber við sær. Afturat tí skal so havast í huga, at fólkaskúlin ongantíð fekk tað aftur, sum varð spart í fyrru helst av 90´unum, og sum víst á omanfyri, so hevur hendan samgongan skert skúlan yvir 30 mio.kr. netto. Hetta gerst ikki betri, um vit seta á stovn privatar skúlar, sum skúlamálaráðharrin er farin at sverma fyri. Um vit býta játtanina út á fleiri skúlar, so merkir tað bara at færri pengar eru til verandi skúlar, og t.v.s. ein verri føroyskur fólkaskúli.

**Eins møguleikar.**
Tí kann málið um at stovnseta frískúlar ikki fatast sum annað enn uttanumtos frá samgonguni. Betri hevði verið, at hon smoygdi upp um armar og royndi at betra viðurskiftini, sum hin føroyski fólkaskúlin skal virka undir.

Meginreglan í føroyska skúlanum skal vera, at øllum skal tryggjast ókeypis undirvísing og somu møguleikar. Sosialu umstøðurnar hjá barninum skulu ikki hava nakra ávirkan á, hvussu góðan ella vánaligan skúla eitt føroyskt barn skal ganga í. Men hesin skilnaður kemur í kjalarvørinum av privatum skúlum.

**Í herna móti sosiala arvinum.**
Heldur enn at býta børnini sundur áttu vit eins og grannalondini at fara í herna móti negativa sosiala arvinum. Ein máti at herða hetta stríð er, at betra eftirútbúgvingina av lærunum og soleiðis styrkja vitan teirra um, hvussu sosialir trupulleikar arvast. Vit mugu brynja føroyska fólkaskúlan til framtíðina. At gera sum Tjóveldisflokkurin og tosa um yvirtøkur, men ongan áhuga vísa fyri tí, ið yvirtikið er, skal skiftast út við ein politikk, sum setir "Fólkið Fyrst."

**Sterk felags virði.**
Nýggi politikkurin skal hava sum mál at fyrireika uppvaksandi ættarliðið til at liva og virka í einum samhaldsføstum, fólkaræðis samfelag. Vit skulu minnast til, at sterk felags virðir skapa ein sterkan felagskap, og tey virðir, sum bera fólkaskúlan í dag, eru somu virði, sum bera samfelagið, tá næmingarnir gerast vaksnir og skapa komandi føroyska samfelagið.

**Vanvirða læraran**
Allir næmingar skulu læra at lesa, skriva og rokna. Men í alheims samfelagnum er hetta ikki nokk. Skúlin skal eisini styrkja kreativitet, samstarvsevni og sjálvbjargni. Harafturat skulu næmingarnir hava tamarhald á kunningartøkni. Eisini kunnu nevnast øll tey kravdu undirvísingarevnini og soleiðis kundi verði hildið fram. Hetta og mangt annað skal skúlin eisini taka sær av. Politiski myndugleikin leggur ikki í at viðgera, hvussu hetta skal gerast. Nýggja fólkaskúlalógin er ein góður karmur, men Føroya Lærarafelag hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at skúlaverkinum tørvar hægri játtan. Sáttmálasettu lærararnir vóru eisini í verkfalli fyri at fáa samgonguna at fara til verka og geva skúlanum umstøður at virka undir. Men nú kunnu vit bara staðfesta, at hóast føgur orð so er onki hent, og nú løgtingsvalið nærkast, roynir skúlamálaráðharrin at fáa Løgtingið at tjakast um frískúlar og vónar, at veljarin gloymir vanstýringina av føroyska skúlanum.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Er lygnin eitt góðkent amboð hjá útvaldum tjóðveldismonnum?

**Thomas Arabo**



Eitt tað ljótasta kapittul í føroyskari politiskari søgu bleiv skrivað, tá ið Signar á Brúnni fór frá sum landsstýrismaður. Signar fór frá, meðan málið um pengar til SVF bleiv kannað. Hann hevði eitt lyfti frá flokkinum, um at hann kundi fara í starvið aftur, um kanningin vísti, at einki skeivt var farið fram. Hettar var júst tað, ið kanningin vísti. Men Signar kom ikki í starvið aftur, so tann (floksformaðurin?), sum hevur givið lyfti um hettar, má so hava logið.

Eg havi so verið úti fyri, at bæði Høgni og Tobbi hava ávikavist skoytt uppí og klípt burtur av setningum, ið teir endurgeva, fyri at broyta upprunaligu meiningina, so hon passar í teirra kramm. Hetta er bara ein annar máti at lúgva uppá.

Tobbi royndi sum landsstýrismaður at lúgva uppá nøkur heiðursfólk úr Vestmanna. Tað gekk ikki, og Tobbi mátti fara til hús.

Nú sær tað út til at Karsten kanska hevur roynt seg í ”branchuni”. Hann sigst at hava brúkt løgtingsins røðarapall at ”pella” um rentuna á donsku statslánunum. Heri Mohr, ið altíð er ein ógvuliga konkretur maður, vísur í bløðunum á, at Karstin átti at vitað betur út frá teimun upplýsingum, ið eru tøkir í Fíggjarmálastýrinum.

Nú er tað soleiðis, at tað er eingin skomm at vita for lítið. Hevur ein sagt nakað uttan at vita betur, ja so gevur man eina umbering - so er tað í lagi. Verri er, um man við vilja hevur sagt ósatt fyri Løgtinginum.

Landsstýrisfólk eru umsitarar fyri løgtingið á sama hátt, sum stjórar eru tað hjá einari nevnd. Um ein stjóri lýgur fyri nevndini, so verður hann koyrdur til hús. Um nevndin veit, at viðkomandi lýgur, og einki ger, so verður hon skift út við næsta nevndarval.

# Várið er komið – eisini til Fólkaflokkin

**Atli Hansen**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy*



Tá íð henda samgongan sáð dagsins ljós fyri úti við fýra árum síðani, vóru vit nógv, sum gittu, hvat Fólkaflokkurin hevði í kvittanum. Hann vildi látast at ganga langt á loysingarleiðini saman við Tjóðveldisflokkinum ímóti, at hesin svølgdi nakrar borgarligar kamelar. Og tá íð so valið nærkaðist, skuldi flokkurin sleppa sær úr hesum óhóskandi paralagnum.

Ikki alt hevur gingið soleiðis. Løgmaður fekk ein varaløgman, sum var honum ov sterkur. Hesin hevur við síni fyrilitsleysu framferð og síni villleiðandi propaganda ofta roynt samanhaldið í samgonguni og enn hevur løgmaður givið eftir so at siga hvørja ferð. Í grein í føroysku bløðunum 23.09.99 skýrdi eg henda varaløgmann at vera fólkavillleiðara. Um eg tá hevði vitað tað, sum eg veit í dag, hevði eg verið noyddur at funnið mær eina stalinistiska synonymorðabók fyri at komið fram á eitt meira dekkanadi orð. Ótrúligt sum hesin varaløgmaður er sloppin at hóreiggja sær politiskt – uttan avleiðingar.

Ein oyðimarkarkargongd í fullveldistoku í 3 ár og 10 mánar hevur gjørt, at millum lítið og einki er komið á skafti í løgtinginum hetta valskeiði. Meiningarkanningar hava latið løgmann vita, at hann og Fólkaflokkurin vóru á skeivari leið í fullveldismálinum, men hann vildi ikki taka avleiðingarnar og lata fólkið fortelja honum, hvat íð hann so átti at gjørt..

Sama við borgarliga politikkinum. Hann hevur verið illa vardur undir hesum landsstýrinum. Eingi initiativir ella nýhugsanir á nøkrum vinnuligum øki, bert umsiting. Og so nú eina útgjaring av tí aðru verð fram móti valinum.

Vit fara at arva eina fíggjarlóg, sum varð skerd við úti við 400 mió. kr. Og tá skuldi hon javnviga. Men hvat ger so samgongan við fólkaflokslógmanni á odda? Vælvitandi um alla ta útgjaring, sum skal fara fram um ein mána ella tveir aftaná, at fíggjarlógin er viðtikin, látast teir sum einki. Tað er næstan eingin endi á øllum íð skal býtast út, nú val er í hondum. Og alt skal fíggjast á eykafíggjarlógum, sum lætt kunnu skapa eitt hall, íð telist við 100 tals milliónum á roknskapinum fyri ár 2002. Hetta er ábyrgdarloysi og skilaleys framferð út um øll mørk.

Men nú sær so Fólkaflokkurin – sum væntað – út til at hava broytt kós. Bjarni Djurholm hevur við eini grein í Sosialinum 09.02.02. boðað frá broytta málinum. Hann hevur hugt upp um sambandsgarðin og sæð ta grønu eingina, har eisini nakrar av hansara fyrrverandi atkvøðum ganga Tær síggja út til at hava tað gott, har sum tær eru og soleingi Bjarni einki nýtt og einki betri hevur at bjóða teimum, vera tær helst verandi har.

Í veruleikanum fæst alt hetta, sum Bjarni hevur við í síni grein, á føroyska politiska marknaðinum frammanundan.

Við at lesa nýskipanaruppskotið og stevnuskránna hjá Sambandsflokkinum fær man m.a. at vita

- At Føroyar skulu vera ein ”sjálvstýrandi tjóð” og at hetta skal staðfestast í komandi broytingum av grundlógini. Tað ska eingin ivi vera um, at okkara heimastýri ikki kann takast aftur.
- Yvirtøkur kunnu fremjast, um vit bert gjalda so hvørt. Hetta er einki nýtt Heimastýrislógin, sum samgongan umsitur eftir í løtuni, leggur upp til hetta.
- „Ein lagalig og varlig skipan, har eingi óráð verða tikin“ skrivar Bjarni. Hetta hevur verið aðalmerki hjá Sambandsflokkinum til allar tíðir.
- Viðurskiftini millum Føroyar og Danmørk hava verið í tryggari legu, men her fór alt út av kós við tí konfrontatiónspolitikki, sum sum henda samgongan við Fólkaflokkinum á odda legði lunnar undir.
- Bjarni skrivar um eina skipan, sum „fjøldin“ av føroyingum tekur undir við. Eg giti, at hann hervið sipar til Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og so í minsta lagi helvtina av Fólkaflokkinum og tá eru vit helst nokso nógv.

Og so er væl bert eftir spurningurin um, hvat barnið skal eita. Skal tað ver ein heimastýrisskipan við onkrari smábroyting av grundlógini ella skal tað vera ein samveldisskipan við onkrari aðrari smábroyting av grundlógini. Ella ein klóning – kanska ? Innihaldið í greinini er fyri tað mesta sum avrit av sambandshugsjónini, so tað kunnu vit skjótt semjast um.

At enda skrivar Bjarni: „Vit mugu koma burtur úr naggatódnini. Nú er stundin komin, har vit í sátt og semju normalisera og fáa trygg, lagalig og skilagóð viðurskifti Føroyar og Danmarkar ímillum.” Einki sambandsfólk kundi formulera hetta betri.

So Bjarni, vælkomin aftur á leið, men lat atkvøðurnar hjá okkum vera í frið í sambandsgarðinum. Har hava tær tað best. Tær skulu nýtast eftir komandi væl til at føra sambandspolitikk við – eisini tær vónbrotnu fólkafloksatkvøðurnar, sum eru komnar á dyr í valskeiðinum. Vit ætla at hjúgla um tær.

Kanska kann eg nerta við tykkara vánaligu samvitsku við at vísa til mína grein í føroysku bløðunum 22.10. 99 undir yvirskriftini Sambandsflokkurin – Javnaðarflokkurin – Fólkaflokkurin.

Men vit kunnu náa tað enn.

# Eldrarøktin misrøkt

**Leivur Hansen,**
*valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi til løgtingsvalið*



Ásannast má, at landið hevur ikki fingið nóg mikið á skaftið, tá ræður um eldraøkt.

Alt ov lítið - fyri ikki at siga púrt onki - er hent frá landsins síðu á hesum øki seinastu árini.

Soleiðis kennist tað ið hvussu er hjá teimum avvarðandi.

Og ivaleyst eisini hjá mongum kommunustýrislimum runt um í landinum.

At kalla úr hvørjum heraðshorni ljóða neyðarróp frá einstaklingum, felagsskapum og kommunum um vantandi ellis- og røktarheimspláss.

Men landið vil hava kommunurnar at leggja rygg til hesa bygging, hóast landið nú í sløk tvey ár hevur havt fullu ábyrgdina av eldrarøktini.

Frammanundan vóru landið og kommunurnar felags um hesa uppgávu, men tá kommmunurnar á sumri 2000 yvirtóku fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av barnaansingini, yvirtók landið samstundis fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av teimum eldru.

Hetta var tó ongantíð ætlað sum annað enn ein fyribilsloysn, tí sjálvandi eiga kommunurnar at hava ábyrgdina av borgarunum - úr vøggu í grøv.

Hesum var semja eisini um millum partarnar undir samráðingunum í 1999 um yvirtøkuna av barnaansingini.

Táverandi landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum setti eisini ein arbeiðsbólk at gera álit og tilmæli um, hvussu hetta kundi verða gjørt, men innanhýsis ósemja í landsstýrinum bar í sær, at málið kom í drag - og framvegis er óloyst.

Sum borgarstjóri varð eg mangan konfronteraður við henda trupulleika, tá avvarandi hjá eldri óhjálpnum fólkum í reinari desperasjón vendu sær til mín við bøn um at fáa tey gomlu inn á ellis- og røktarheim ella eldrasambýli, uttan at eg - so fegin eg enn vildi - fekk rætt teimum somikið sum lítlafingurin.

Støðan er onki batnað síðani, men stendur tvørturímóti við og versnar.

Hetta hevur havt við sær, at kommunurnar sjálvar nú uppá egið initiativ seta bráðneyðug tiltøk í verk.

Hetta eigur at siga øllum somikið, at her ruggar ikki rætt.

Hetta er onki minni enn ein vanærislig skomm fyri landið, og tí mugu og skulu neyðug stig nú takast til tess at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Dygdin í einum samfelagi kann metast eftir, hvussu samfelagið fer við teimum veikastu, verður sagt.

Um so er, so hava vit sanniliga nógv at taka hond í á hesum øki.

Men so ræður eisini um at koma í gongd sum skjótast, soleiðis at vit kunnu tryggja okkara gomlu ein virðiligan aldurdóm.

Soleiðis sum tey sjálvandi bæði eiga rætt til og hava uppiborið.